UTTAN ÚR HEIMI

Kvinna við róðrið

Tann unga Radmilla Sekerinska er fyribils vald til forsætisráðharra í Makedonia, men nógv bendir á, at hon verður sitandi í embætinum.

Tey politisku viðurskiftini í Makedonia hava verið óstøðug tað seinasta árið. Fyrst doyði Boris Trakkovski, forseti, í einari flogvanlukku, og avgjørt varð at velja forsætisráðharran, Branko Cevenkovski, til forseta. Í hansara stað varð Hari Kostov valdur til forsætisráðharra, men nú hevur hann brádliga lagt frá sær. Tí er varaforsætisráðharrin, Radmilla Sekerinska, vorðin stjórnarleiðari.

Keldur í Skopje siga við norska blaðið Dagsavisen, at tað kann væl henda, at hon verður sitandi í forsætisráðharraembætinum, tá stjórnin ætlandi verður endaliga umsipað seinni í vikuni. Radmilla Sekerinska er sosialdemokratur.

Powell í Miðeystri

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, ger nú sína seinastu roynd at fáa ísraelsmenn og palestinar at taka friðartingingarnar uppaftur.

Powell kom til Ísraels sunnudagin, og sambært ísraelska blaðnum Haaretz fer hann at leggja trýst á ísraelsku stjórnina fyri at fáa hana at taka herin úr býunum á Vestara Áarbakka, áðrenn palestinar skulu velja nýggjan forseta í januar. Eitt annað krav er, at ísraelski herurin skal taka fleiri vegabyrgingar niður, og at ymsar ísraelskar avmarkingar í teimum palestinsku økjunum skulu setast úr gildi. Palestinasku leiðararnir sleppa heldur ikki undan krøvum. Sum skilst fer Powell at krevja, at teir skulu fara harðari fram ímóti teimum víðgongdu bólkunum.

Kanningar í teimum palestinsku økjunum hava víst, at nógvir palestinar vilja hava Marwan Barghouti at taka við sum forseti eftir Yasser Arafat. Trupulleikin er, at Barghouti situr í fongsli í Ísrael, men sambært amerikonskum tíðindastovum hava palestinsku myndugleikarnir biðið Colin Powell gera sítt til, at hann verður latin leysur. Marwan Barghouti var ein av leiðarunum í Fatahfelagsskapinum og er nógv betur umtóktur ímillum palestinar enn eitt nú Ahmed Qurie, forsætisáðharri.

Tað ljóðar annars, at teir palestinsku leiðararnir eru misnøgdir við, at amerikanska stjórnin hevur slept tankanum um at stovna eitt palestinskt ríki næsta ár, soleiðis sum tann upprunaliga ætlanin var. Áðrenn hann fór úr Washington, segði Powell, at ætlanin er at stovna tað palestinska ríkið, so skjótt tað letur seg gera.

Roynir kanska aftur

Republikanski senatorurin John McCain sigur nú, at hann fer kanska at royna at gerast valevni hjá republikanarunum til forsetavalið í 2008.

McCain kappaðist ímóti George W. Bush um at stilla upp fyri republikanararnar fyri fýra árum síðani, men tapti. Men nú sigur hann seg vera til reiðar at taka ein dyst afturat, sjálv um hann verður 72, tá forsetaval verður aftur.

John McCain er senatorur í statinum Arizona, og hann hevur nógvar stuðlar ímillum republikanararnar, men sambært amerikonskum fjølmiðlum er hann eisini væl umtóktur ímillum nógvar demokratar og óheftar veljarar.

Kanna harðskap

18 yvirmenn í týska herinum eru koyrdir til hús, meðan myndugleikarnir kanna, um teir hava gjørt seg inn á ungar hermenn.

Ákæruvaldið í býnum Múnster vil vera við, at teir 18 yvirmenninir hava farið illa við fleiri ungum hermonnum í einari legu nærhendis niðurlendska markinum. Eitt nú vórðu teir ungu hermenninir slignir, spulaðir við køldum vatni, og summir fingu eisini elektriskan stoyt.

Herleiðslan vil ikki gera viðmerkingar til málið, men váttar, at teir 18 yvirmenninir eru sendir til hús fyribils.

Ruðuleiki í Ukraina

Sum væntað endaði forsetavalið í Ukraina í ruðuleika. Andstøðan leggur myndugleikarnar undir grovt valsvik

VAL
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Sjálvt um allar kanningar undan forsetavalinum í Ukraina sunnudagin vístu, at andstøðuvalevnið, Viktor Jusjtjenko, fór at vinna, var úrslitið tað beint øvugta, tá uppteljingin var um at vera liðug í gjár.

Tá kunngjørdu myndugleikarnir, at valevnið hjá stjórnini, Viktor Jankivitj, hevði fingið 48,8 prosent av atkvøðunum, og at Jusjtjenko hevði fingið 47,4 prosent. Sonevndar exitpoll kanningar valdagin vístu annars, at andstøðuvalevnið fór at fá 54 prosent av atkvøðunum.

Í gjár segði Viktor Jusjtjenko í einari røðu fyri fleiri túsund viðhaldsfólkum, at tað var eingin ivi um, at andstøðan hevði vunnið valið, og hann bað viðhaldsfólkini mótmæla valsvikinum hjá myndugleikunum.

– Vit vunnu valið, og vit mugu verja sigurin. Statskvettið í Ukraina er longu í gongd, segði hann og sipaði við valsvikið. Hann boðaði samstundis frá, at andstøðan fer at kæra valmyndugleikarnar fyri ES og evropeiska samstarvsfelagsskapinum OSCE.

Í fyrra valumfarinum, sum var 31. oktober, staðfestu valeygleiðarar hjá ST, ES og USA umfatandi valsvik. Eitt nú vísti tað seg, at í summum valdømum vóru fleiri atkvøður enn veljarar.

Forsetavalið í Ukraina verður mett at vera tað týdningarmesta, síðani landið tók seg burtur úr Sovjetsamveldinum í 1991. Valevnið hjá stjórnini vil varðveita tað góða sambandið við Russland, meðan andstøðuvalevnið vil hava Ukraina nærri ES.

Gera gjøldur burtur úr deyðum palestinum

Nógvir ísraelsmenn eru í øðini, eftir at landsins størsta blað hevur almannakunngjørt myndir av hermonnum, sum gera gjøldur burtur úr deyðum palestinum

ÍSRAEL
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Tað eru myndir sum hendan, ið hava fingið øði í nógvar ísraelsmenn

Ísraelska herleiðslan hevur nóg mikið at takast við í hesum døgum. Fyrst noyddist Moshe Yaalon, herovasti, í telefonina at biðja egyptiska forsetan, Hosni Mubarak, um umbering fyri, ein ein ísraelskur stríðsvognur hevði skotið tríggjar egyptiskar løgreglumenn, og nú hevur blaðið Yedioth Aharonot prentað myndir av hermonnum, sum gera gjøldur burtur úr deyðum palestinum.

Myndirnar, sum blaðið hevur prentað, vísa millum annað ein hermann standa uppi yvir einum deyðum palestina. Hermaðurin siktar eftir palestinanum, samstundis sum hann hevur sett annan fótin á líkið. Blaðið sigur seg eisini hava eina mynd, har ein hermaður hevur sett eina sigarett í munnin á einum deyðum palestina.

Moshe Yaalon, herovasti, var sjónliga illa við av myndunum, tá hann hitti tíðindafólk um vikuskiftið.

– Slíkt skal ikki henda í ísraelska herinum, sum fær umfatandi frálæru í altjóða mannarættindum. Hetta stríðir ímóti okkara reglum, og eg kann vissa tykkum, um, at hetta verður kannað til botns, segði Moshe-Yaalon.

Í Ísrael eru nógv fólk í øðini um framferðina hjá hermonnunum, sum minier tey um tað, sum hendi í Abu Ghraib-fongslinum í Irak, skrivar Reuter. Øðin er ikki vorðin minni, eftir at fleiri heryvirmenn hava mælt mndugleikunum frá at revsa hermenninar.

Eivør Pálsdóttir útgávukonsert

Nýggja fløgan hjá Eivør kemur út týsdagin, og í tí sambandi fara Eivør og Bill Bourne at hava konsertir týskvøldið og Mikukvøldið. Bill Bourne fer eisini at hava konsert hóskvøldið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

Týsdagin 23. nov kemur nýggja fløgan hjá Eivør Pállsdóttir út.

Í hesum sambandi fer Eivør at hava konsert í Müllers Pakkhúsi týskvøldið kl. 19.30. Men av tí, at hendan konsertin longu er útseld, verður ein eykakonsert í Pakkhúsinum, mikukvøldið kl 19.30.

Billettir til mikukvøldskonsertina fáast í Kunningarstovunum í Runavík og í Havn.

Fyrireikararnir siga, at nógv er gjørt burturúr at gera Müllers pakkhús hugnaligt og spennandi at koma inn í. Millum annað er pallurin prýddur við meiri enn 100 guitarum. Nógv er eisini gjørt fyri at skapa góðan stemning við ljósi og ikki minst við góðum ljóði.

Eivør Pálsdóttir og Bill Bourne komu til landið mánadagin, og saman fara tey nú at fyrireika seg til útgávukonsertirnar.

Eivør fer longu avstað aftur hósdagin, tí hon er á palli í Reykjavík hvørt fríggjakvøld og leygarkvøld í Hafnarfjarðarleikhúsinum, har leikurin, ið byggir á gomlu Úlfhamssagaina framvegis verður framførdur. Eivør hevur gjørt tónleikin til leikin, og virkar sum frásøgufólk, har hon syngjandi sigur frá søgugongdini.

Bill Bourne, ið tey flestu munnu kenna frá G! Festivalinum og »Mær leingist«, steðgar ein dag longur, og fer at hava konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði hóskvøldið.

– eys –

Royndir í musikkskúlanum

Í døgunum 23.-27. november, fara 124 næmingar á Musikkskúlanum til royndir. Royndirnar eru sjálvbodnar og verða hildnar ymsa staðni í landinum

Hesa vikuna skipar Musikkskúlaskipanin fyri, at næmingar, sum eru í Musikkskúlaskipanini, sleppa upp til roynd, um teir ynskja tað.

124 næmingar úr øllum landinum hava tikið av tilboðnum um royndina. Næmingarnir spæla á ymisk ljóðføri.

Tað er enski metingarstovninum Associated Board of The Royal Schools of Music, ið kemur at døma støðið hjá ungu, føroysku tónleikarunum.

Royndómari hesaferð er Eileen Field, sum er útbúgvin pianistur og sangari á Royal Academy of Music eins og á Royal Schools of Music. Eileen Field hevur drúgvar royndir sum lærari í klaveri, fylgispæli og í sangi og hevur stjórna nógvum kórum og bólkum.

Í løtuni skrivar hon undirvísingartilfar fyri Boosey and Hawkes, og herfyri kom út eitt savn við "20th Century Easy Song Collection", sum hon hevur lagt til rættis.

Umboð fyri Musikkskúlaskipanina siga, at tað í ár eru heldur fleiri næmingar á hægru stigunum enn árini frammanundan. Royndin er tí ætlað sum ein liður í menningini av ljóðførisspælinum.

Royndir eru á hvørjum ári í Føroyum og til ber at taka prógv á byrjanar- og á konservatoriistigi.

Royndirnar verða hildnar í Havn, Klaksvík og í Vágum í døgunum frá 23. til 27.november.

– Eys –

Savnsmynd

Kennir tú nakran við etingarólagi?

Nakrar mammur at gentum við etingarólagi, hava í eina tíð møtst at práta um síni viðurskifti. Nú vilja tær gera fundirnar til ein fastan tátt, og bjóða øðrum avvarðandi við

Stuðulsbólkurin fyri avvarðandi hjá fólki við etingarólagi, sum er anoreksi og bulimi, ætlar nú at fáa fundirnar í eina fasta legu og at bjóða øðrum avvarðandi við.

Sum er, eru tær bert nakrar mammur, ið hittast, men tær vilja fegnar hava foreldur, systkin, menn, konur, vinfólk ella á annan hátt avvarðandi at fólki við etingarólagi við í stuðulsbólkin.

Fundur verður í felagsskúlanum á Oyrabakka leygardagin 27. november kl 16.00.

Á fundinum fer Alis Jacobsen, foreldur at barnið við etingarólagi, at tosa um evnið: »Mytur um anoreksi«. Síðani verður prátað um, hvussu tað er at vera avvarandi, hvørjar spurningar ein setur sær og um tær ymisku royndirnar, sum fólk hava gjørt sær.

– eys –

Friðarligt vikuskiftið

Løgreglan sigur, at vikuskiftið hevur verið sera friðarligt. Hóast jólaforkostarnir eru byrjaðir, so hevur løgreglan ikki merkt nakað til hetta enn. Úr Havn frætta vit nevniliga, at vikuskiftið hevur verið sjáldsama friðarligt.

Bilur bakkaði á

Í Klaksvík var ein minni ferðsluóhapp um vikuskiftið.

Ein bilur, ið stóð inni á einum parkeringsbási, skuldi avstað og bakkaði tí út á vegin. Júst tá kom ein bilur koyrandi ímóti, og hesin fekk ikki steðga, allarhelst orsakað av hálkuni. Vakthavandi í Klaksvík sigur, at báðir bilarnir fingu nakað av skaða, men tíbetur var eingin persónsskaði.

Húsaófriður

Leygarnáttina fekk løgreglan í Klaksvík eisini eina fráboðan um húsaófrið. Teir fóru á staðið, og vóru noyddir at taka ein mann við sær avstað. Vakthavnadi sigur at tað er ymsikt hvat teir gera við mans, sum verða tiknir við orsakað av húsaófriði.

– Tað kemur an uppá støðuna. Onkuntíð verða teir tiknir við inn á støðina, og verða so blakaðir í brummuna her. Men eru teir róligir, so kemur tað eisini fyri, at teir verða koyrdir heim til familjuna. Tað, sum er mest umráðandi, er bara at fáa tey bæði bæði, sum eru farin til hendurs, so langt burtur frá hvørjum øðrum sum gjørligt, sigur vakthavandi í Klaksvík.

Rúsdrekkakoyring

Av politistøðini á Tvøroyri frætta vit, at ein bilførari var tikin fyri at koyra rúsdrekkakoyring. Vakthavandi sigur, at bilførarin varð tilvildarliga steðgaður í Vági, og tað vísti seg so, at hann var ávirkaður av rúsdrekka. Promillan var tó ikki nakað serliga høg, hóast hon var yvir markið, sigur vakthavandi.

– Eys –